# 100 milliónir til børn og ung




**MUNAR VÆL**

*Petur Elias Petersen, forseti í Ítróttasambandi Føroya, tekur ímóti stóra kekkinum frá Tórfinni Højgaard, nevndarformanni í Sp/f Ítróttavedding. Lítið man vera at ivast í, at seks milliónir muna væl hjá føroyska ítróttinum*

**VEDDING** Hesa ferð koma meira enn 10 milliónir krónur tí barna- og ungdómsarbeiði til góðar, sum Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið varða av

Hilmar Jan Hansen

Tær samanlagt 10 milliónir krónurnar býtir Sp/f Ítróttavedding soleiðis út millum tey trý, at Ítróttasamband Føroya fær góðar seks milliónir krónur, meðan Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið fáa góðar tvær milliónir krónur í part.

Samlaða upphæddin hesa ferð, sum er tilsamans 10 milliónir og 71.000 krónur, er tann næststørsta, sum verður lutað út, síðani farið var undir samstarvið millum Sp/f Ítróttavedding og donsku veddingartænastuna í 1998. Bara í 2005, tá upphæddin var 10,2 milliónir, hevur hilnast betur.

Upphæddin, ið verður lutað út, skiftir eitt sindur frá ári til árs, alt eftir hvussu ídnir føroyingar eru at vedda og spæla hjá Danske Spil, og tískil hevur árið í fjør verið eitt av teimum bestu í so máta.

Øll hesi árini, síðani tað bar til at vedda í Føroyum, eru yvir 100 milliónir krónur lutaðar út til barna- og ungdómsarbeiði, og er hetta eitt stórt og týdningarmikið íkast til barna- og ungdómsarbeiði í Føroyum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# KÍF og H71 fingið venjarar

**HONDBÓLTUR** Jan Ottosen heldur fram hjá kollfirðingum, og Kári Nielsen og Halgir Dahl-Olesen skulu venja hoyvíkingar

Hilmar Jan Hansen

So smátt byrja venjarakabalurnar hjá teimum ymsu mansliðunum í hondbólti at ganga upp. Herfyri frættist, at Ingi Olsen fer aftur til Vestmanna, har hann saman við Dia Midjord skal venja VÍF-menninar, og samstundis frættist, at Morten Hust Petersen skal venja menninar hjá Neistanum. Somuleiðis hevur Team Klaksvík fingið nýggjan venjara, sum verður Claus Rasmussen.

Nú boðar Kollafjarðar Ítróttarfelag frá, at Jan Ottosen, sum síðstu tvey árini hevur fingið heiðurin sum ársins venjari, eisini næsta kappingarár skal standa á odda fyri besta mansliðnum hjá kollfirðingum.

Jan Ottosen hevur síðani 2009 við hepnari hond vant mansliðið hjá kollfirðingum, sum hesi árini hevur ment seg frá botnliði til at vera næstbest í bæði lands- og steypakapping.

– Vit í felagnum eru fegin um at kunna samstarva við Jan Ottosen eitt kappingarár afturat, so tað arbeiðið, hann hevur byrjað, kann halda fram. Somuleiðis var tað eitt breitt ynski frá spælarahópinum at fáa Jan aftur við róðrið komandi kappingarár, sigur KÍF í tíðindaskrivi.

Hoyvíkingar melda nú eisini út, hvussu teirra venjarapar skal síggja út komandi vetur, og tað verða Kári Nielsen og Halgir Dahl-Olesen, ið skulu standa á odda fyri mansliðnum hjá H71. Tað skrivar heimasíðan hjá H71.

Samstundis verður upp á ein máta vent aftur til veturin 2008/2009, tá H71 vann sítt fyrsta føroyameistaraheitið í bestu mansdeildini, tí tá var Kári Nielsen venjari og Halgir Dahl-Olesen ein av týðandi spælarunum á vøllinum. Nú verður Kári høvuðsvenjari og Halgir hjálparvenjari.

Tað vóru annars Daniel Rapa og Petur Mittún, sum stóðu á odda fyri H71 síðsta kappingarár.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## 1. DEILD MENN

**TB - FCS** 2-2 (1-0)
1-0: Bárður A. Dimon, 10.
1-1: John T. Poulsen, 71.
2-1: Tórur Mortensen, 74.
2-2: John T. Poulsen (br.), 84.

**AB - NSÍ II** 4-0 (3-0)
1-0: Nicolaj Eriksen, 5.
2-0: Nicolaj Eriksen, 39.
3-0: Jobin Drangastein, 42.
4-0: Alex Mellemgaard, 55.

**FCH - Skála** 1-4 (0-2)
0-1: Jákup Johansen, 16.
0-2: Jákup Johansen, 26.
1-2: Jónar Borg Dahl, 58.
1-3: Rói Jacobsen, 62.
1-4: Brian Jacobsen, 86.

**EB/S II - HB II** 2-0 (1-0)
1-0: Jónstein Magnussen, 24.
2-0: Jens Michael Jensen, 81.

**Vík. II - 07V II** 5-2 (4-1)
1-0: Kaj Leo í Bartalsstovu, 20.
2-0: Ingi Sørensen (br.), 39.
3-0: Ingi Sørensen, 40.
4-0: Dánjal Pauli Lervig, 42.
4-1: Karl Jóhan Djurhuus (br.), 44.
4-2: Ragnar Nattestad, 70.
5-2: Per Gregersen, 82.

### Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 8 | 5 | 3 | 0 | 18 | 6 | +12 | 18 |
| 2 | NSÍ | 8 | 5 | 2 | 1 | 25 | 9 | +16 | 17 |
| 3 | Víkingur | 8 | 5 | 2 | 1 | 17 | 8 | +9 | 17 |
| 4 | EB/Streymur | 8 | 4 | 1 | 3 | 13 | 8 | +5 | 13 |
| 5 | KÍ | 8 | 3 | 1 | 4 | 14 | 11 | +3 | 10 |
| 6 | HB | 8 | 3 | 1 | 4 | 13 | 13 | 0 | 10 |
| 7 | B68 | 8 | 2 | 2 | 4 | 13 | 12 | +1 | 8 |
| 8 | ÍF | 8 | 2 | 2 | 4 | 11 | 14 | -3 | 8 |
| 9 | 07 Vestur | 8 | 2 | 2 | 4 | 8 | 24 | -16 | 8 |
| 10 | B71 | 8 | 1 | 0 | 7 | 5 | 32 | -27 | 3 |

### Føroyska 1. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Suðuroy | 7 | 5 | 2 | 0 | 21 | 9 | +12 | 17 |
| 2 | AB | 7 | 5 | 0 | 2 | 24 | 9 | +15 | 15 |
| 3 | NSÍ II | 7 | 5 | 0 | 2 | 20 | 10 | +10 | 15 |
| 4 | TB | 7 | 4 | 2 | 1 | 22 | 8 | +14 | 14 |
| 5 | EB/Streymur II | 7 | 4 | 0 | 3 | 16 | 14 | +2 | 12 |
| 6 | Skála | 7 | 3 | 1 | 3 | 14 | 11 | +3 | 10 |
| 7 | FC Hoyvík | 7 | 2 | 1 | 4 | 9 | 18 | -9 | 7 |
| 8 | HB II | 7 | 2 | 0 | 5 | 7 | 19 | -12 | 6 |
| 9 | Víkingur II | 7 | 1 | 2 | 4 | 8 | 17 | -9 | 5 |
| 10 | 07 Vestur II | 7 | 0 | 0 | 7 | 7 | 33 | -26 | 0 |